

# HALLO



*Eyðun Jacobsen, fyrireikari av Fjarðafestivalinum*

## Hvat er tað besta við summarinum?

- Tað besta við summarinum er tað góða veðrið, um mann kann siga soleiðis, tá mann býr í Føroyum. Tann ljósa tíðin, langir dagar, og so kanska at sleppa ein túr uttanlands til eitt heitari stað. Annars er besta byrjanin upp á summarið Fjarðafestivalurin.

**Hvat dámar tær betur, ljósar ella myrkar nætur?**

- Avgjørt ljósar nætur. Haldi, at tú verður glaðari og í betri lag, tá ið kvøldini og næturnar eru ljósari. Soleiðis er tað í øllum førum við mær.

**Hvar kundi tú hugsa tær at farið at ferðast?**

- Ísrael er eitt land, eg kundi hugsa mær at farið aftur til, um eg hugsi um tað søguliga virðið. Annars Lanzarote, um tað skal verða feria, og Australia er eisini eitt stórt ynski hjá mær at sleppa til.

# Forbrend




Ongin hevur forspurt seg – og tó ...

## Í MORGIN




Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og landsynningi og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 10 og 13 stig.

## MIKUDAGIN




Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og suðri og um morgunin regn. Annars turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 10 og 13 stig.

## HÓSDAGIN




Fleyr til gul av suðri og fyrrapartin yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin regn eitt skifti. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 11 og 15 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 1007 hPa. við Føroyar grynnist. Ein hitabrúgv frá Hvarvinum til Írlands kemur hendavegin.




**Komandi nátt:**
Brúgvaløgini í útsynning úr Føroyum koma hendavegin og hava regn og lýggjari veður við sær.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 70 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 6 | Tromsø | 4 | Moskva | 19 | Athen | 24 |
| Reykjavík | 10 | Bergen | 8 | Berlin | 15 | Beijing | 22 |
| Tórshavn | 3 | Oslo | 11 | Paris | 16 | New Dehli | 38 |
| Lerwick | 5 | Stokkhólm | 8 | Madrid | 16 | Bangkok | 38 |
| Aberdeen | 10 | Keypmannah. | 8 | Róm | 19 | Sydney | 23 |
| London | 9 | Helsinki | 4 | Malorca | 21 | New York | 11 |

## VESTFALLSKYRRINDI

6. mai — Mánin longst frá jørðini
14. mai — Tendring
20. mai — Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 17. mai | 10:05 | 22:33 | 09:05 | 21:33 | 09:20 | 21:48 | - | 12:05 | 00:38 | 13:05 | 08:20 | 20:48 | 07:20 | 19:48 | 10:20 | 22:48 | 11:20 | 23:48 | 09:50 | 22:18 | 11:05 | 23:33 |
| 18. mai | 10:57 | 23:25 | 09:57 | 22:25 | 10:12 | 22:40 | 00:33 | 12:57 | 01:33 | 13:57 | 09:12 | 21:40 | 08:12 | 20:40 | 11:12 | 23:40 | - | 12:12 | 10:42 | 23:10 | 11:57 | - |
| 19. mai | 11:50 | - | 10:50 | 23:14 | 11:05 | 23:29 | 01:25 | 13:50 | 02:25 | 14:50 | 10:05 | 22:29 | 09:05 | 21:29 | - | 12:05 | 00:40 | 13:05 | 11:35 | 23:59 | 00:25 | 12:50 |
| 20. mai | 00:14 | 12:37 | 11:37 | - | 11:52 | - | 02:14 | 14:37 | 03:14 | 15:37 | 10:52 | 23:16 | 09:52 | 22:16 | 00:29 | 12:52 | 01:29 | 13:52 | - | 12:22 | 01:14 | 13:37 |
| 21. mai | 01:01 | 13:38 | 00:01 | 12:38 | 00:16 | 12:53 | 03:01 | 15:38 | 04:01 | 16:38 | 11:53 | - | 10:53 | 23:31 | 01:16 | 13:53 | 02:16 | 14:53 | 00:46 | 13:23 | 02:01 | 14:38 |